LANDSVERKFRØÐINGURIN

# Verkfrøðingur

Søkt verður eftir verkfrøðingi til havnadeildina hjá stovninum.

Havnadeildin hevur ábyrgdina av málum viðvíkjandi havnum og lendingum, fysiskari planlegging á sjónum, geofysiskum mátingum og øðrum.

**Arbeiðsuppgávur**
Uppgávur, sum viðkomandi í høvuðsheitum kann rokna við at skula røkja, eru hesar:
- Gera ætlanir fyri landshavnum
- Hevur hald og rakstur av havnum og lendingum um hendi
- Fysisk planlegging á sjónum
- Programmeringar, forkanningar og prosjektgransking
- Eftirlit við verkætlanum og
- Myndugleikaumboðan

**Førleikakrøv**
Sóknast verður eftir verkfrøðingi – helst við royndum innan nøkur av omanfyri nevndu virkisøkjum.

Harafturat kundu vit hugsað okkum at umsøkjarin hevur edv kunnleika viðv. scripting, dátugrunni, dynamiskari heimasíðu og hagfrøðiligari dátuviðgerð.

Umsøkjarin skal hava góð samstarvsevni, skal duga at skipa sítt arbeiðsøki og kann geva sítt íkast til menning av arbeiðsplássinum og vera førur fyri at arbeiða sjálvstøðugt.

**Setanarviðurskifti**
Løn og setanartreytir annars verða sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Verkfrøðingafelag.

**Umsóknir**
Umsóknir við prógvum, møguligum ummælum og lívsgongdarlýsing (cv) verða at senda til Landsverkfrøðingin, Postboks 78, 110 Tórshavn, og skulu verða skrivstovuni í hendi í seinasta lagi 15. januar 2002. Brævbjálvin eigur at merkjast »Verkfrøðingur til havnadeildina«. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast frá Ewaldi Kjølbro á tel. 31 13 33, lokal 316, (e-postur: ewald@lv.fo) ella fartel. 227864.


http://www.sosialurin.fo

Sosialurin
www.sosialurin.fo

Lýsið við brúktum bilum



Sosialurin
www.sosialurin.fo


FØROYA HANDILSSKÚLI
TEKNISKI SKÚLIN TÓRSHAVN

# Kvinnur sum íbirtarar

Várhálvuna 2002 skipa Skeiðsdepilin við Marknagil og Menningarstovan fyri skeiði sum skal fremja møguleikarnar hjá kvinnum at stovna egna fyritøku. Byrjað verður 6. feb.

**Endamálið við skeiðnum er m.a.:**
- at luttakarar fáa kunnleika til hvussu ein fyritøka verður stovnað og rikin,
- at styrkja førleikan hjá luttakarunum at meta um og arbeiða við egnum vinnuhugskotum
- at leiðbeina um, hvar vitan um vinnu fæst,
- at gera eitt samstarvsnet millum kvinnur í Føroyum í somu ella líknandi støðu og millum vinnuhugaðar kvinnur og vinnulívið.

Skeiðið verður lutað sundur í fyrilestrar og uppgávutímar. Í uppgávutímunum verður dentur lagdur á, at luttakararnir gera virkisætlanir, sum kunnu taka støði í egnum vinnuhugskotum. Ráðgevi/-ar verða við stóran part av tíðini at hjálpa til og vegleiða tínari ætlan.

Kvinnur, sum hava ætlanir um at fara undir og/ella longu hava egna fyritøku, verða bidnar um at venda sær til Skeiðsdepilin við Marknagilsvegin at fáa umsóknarblað um upptøku á skeiðnum.

Fyri at tryggja dyggastu leiðbeining verður í sambandi við umsóknina biðið um stutta frágreiðing um vinnuhugskotið. Henda verður hildin í trúnaði.

Kostnaðurin er 4.500 kr.

Seinasta freist at boða frá luttøku er 10. jan. 2002
Nærri fæst at vita við at venda sær til

**SKEIÐSDEPILIN VIÐ MARKNAGIL * SDM**
Marknagilsvegur 77 • Postrúm 177 • 110 Tórshavn • Tel 31 88 13 • Fax 31 33 74,
T-postur: fh-sth@post.olivant.fo • Heimasíða http://sth.olivant.fo

# Kunngerð um útgjaldsdagar í 2002

Við heimild í § 16, stk. 4, í løgtingslóg nr. 113 frá 13. juni 1997 um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing, við seinni broytingum, hevur stýrið fyri Arbeiðsloysisskipanina fyrisett:

**§ 1.** Fyri 2002 verður arbeiðsloysisstuðul útgoldin fyri í alt 252 dagar.
*Stk. 2.* Umframt leygar- og sunnudagar verður ikki útgoldið fyri hesar halgidagar:
- Skírhósdag (28. mars)
- Langafríggjadag (29. mars)
- 2. páskadag (1. apríl)
- Dýra biðidag (26. apríl)
- Kristi himmalsferðardag (9. mai)
- 2. hvítusunnudag (20. mai)
- Jóladag (25. desember)
- 2. jóladag (26. desember)

**§ 2.** Henda kunngerð fær gildi frá 1. januar 2002 og er galdandi fyri alt árið 2002.

Stýrið fyri Arbeiðsloysisskipanina, 13. desember 2001

Karin Kjølbro (sign.) formaður

/Elisabeth O. Gaardbo (sign.)

*ALS hevur til endamáls at veita fíggjarligan stuðul til arbeiðsleys, at virka fyri bøttum møguleikum hjá arbeiðsleysum at fáa arbeiði og at umsita arbeiðsávísing fyri føroyska arbeiðsmarknaðin. Á ALS starvast í løtuni 20 fólk. Virksemið hjá ALS er í høvuðsheitum lógarásett. Ovastu leiðsluna hevur stýrið fyri ALS, sum - eftir tilmæli frá arbeiðsgevara- og løntakarafeløgunum á arbeiðsmarknaðinum - verður valt av Føroya Landsstýri.*

ALS
Arbeiðsloysisskipanin
P.O.Box 3022 • FO-110 Tórshavn
Tel 349550 • Fax 349551
teldupostur: als@als.fo

# KUNNGERÐ

**Frá útskiftingarnevndini fyri hagapartin Fjallið í Oyndarfirði**

Á fundi 18. des. 2001 hevur útskiftingarnevndin gjørt úrskurð um býti av matr. nr. 227, Fjallið, í Oyndarfirði.

Eftir kap. 9 í útskiftingarlógini frá 27. mars 1939 kunnu útskiftingin og úrskurðurin hjá útskiftingarnevndini kærast til yvirútskiftingarnevndina, og er kærufreistin 3 mánaðir frá 2. januar 2002 at rokna. Kærufreistin er úti 2. apríl 2002.

Møguligar kærur skulu vera skrivligar og stílast til Sorinskrivaran, C. Pløyensgøta 1, Tórshavn, ið er formaður í yvirútskiftingarnevndini.

Útskrift av úrskurðinum liggur frammi hjá bygdarráðnum í Oyndarfirði og á Matrikulstovuni í Tórshavn til kærufreistin er úti.

**MATRIKULSTOVAN**
N. v.
Øssur A. Midjord
útsk. form.




HESTPRENT



**BØKUR, BØKUR, BØKUR**
og alt annað prent

Dvørgastígur 7
100 Tórshavn
tel 314 555
fax 318 026
hestprent@hestprent.fo

**Nýggjárskonsertin 2001**
í Ítróttarhøllini á Hálsi

**CHASE**
**ALL THAT RAIN**
**EYÐUN & TERJI**

Leygarkvøldið 29. des.
frá kl. 23.00-03.45

Atgongumerki fáast í forsølu á Statoilstøðum kring alt landið og í 3'arinum og Kunningarstovuni í Tórshavn

Kostnaður 130,-

Høvuðsstuðul: FARODANE City
KYNDIL
HANDILIN · 3arin · ATLANTIC AIRWAYS · Restorffs · FØROYA SPARIKASSI

i
Sosialurin

BýIN
- HVøNN HÓSDAG




LANDSVERKFRØÐINGURIN

# Verkfrøðingur til planlegging og prosjektering

Starv sum verkfrøðingur á plan- og prosjektdeildini hjá Landsverkfrøðinginum er leyst at søkja.
Plan- og prosjektdeildin er deild undir vegadeildini.
Til rætta fólkið kunnu vit bjóða eitt spennandi og áhugavert starv, ið er fakliga og persónliga mennandi og við góðum arbeiðsumstøðum.

**Arbeiðsuppgávur**
Uppgávur, sum viðkomandi í høvuðsheitum kann rokna við at skula røkja, eru hesar:

- Gera ætlanir fyri landsvegakervinum
- Gera ætlanir fyri trygdartiltøkum
- Programmeringar, forkanningar, prosjektering og prosjektgransking
- Eftirlit við verkætlanum og
- Myndugleikaumboðan

**Førleikakrøv**
Sóknast verður eftir verkfrøðingi – helst við royndum innan nøkur av omanfyri nevndu virkisøkjum.
Neyðugt er at viðkomandi hevur vanligan telduførleika. Umframt tey vanligu forritini, nýta við harafturat Microstation og onnur serforrit innan vegaprosjektering.
Stórur dentur verður lagdur á góðar persónligar eginleikar, og rokna vit við, at viðkomandi er fyrikomandi og hevur góð samstarvsevni, dugir at skipa sítt arbeiðsøki og kann geva sítt íkast til menning av arbeiðsplássinum og er førur fyri at arbeiða sjálvstøðugt.

**Setanarviðurskifti**
Tænastustaðið verður skrivstovan í Havn. Løn og setanartreytir annars verða sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Verkfrøðingafelag.

**Umsóknir**
Umsóknir við prógvum og lívsgongdarlýsing (cv) verða at senda til

**Landsverkfrøðingin**
Postboks 78
110 Tórshavn

og skulu verða skrivstovuni í hendi í seinasta lagi 15. januar 2002. Brævbjálvin eigur at merkjast »Verkfrøðingur til vegadeildina«. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.
Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast frá Finnleifi Durhuus, leiðari av vegadeildini, á tel. 31 13 33, lokal 212, (e-postur: finnleif@lv.fo).


**Við tøkk fyri gott samstarv í 2001 ynskja vit viðskiftafólkið okkara gott nýggjár**

LÍV

**P/F FØROYA LÍVSTRYGGING**
Kopargøta 1 · Postboks 206 · FO-110 Tórshavn
Tel. 31 11 11 · Fax 35 11 10 · T-postur: liv@trygging.fo